# Gjáarlon søkir námsfrøðing og hjálparfólk

Søkt verður eftir námsfrøðingi og hjálparfólki til dagstovnin Gjáarlon í Vestmanna at byrja 1. oktober 2006.

**Vit sóknast eftir**
- 1 námsfrøðingi 40 tímar um vikuna.
  Um ongin námsfrøðingur søkir, verður hjálparfólk sett í staðin.
- 1 hjálparfólk 20 tímar um vikuna.

Dagstovnurin er í 5 eindum við vøggustovu og barnagarði – skipaður til íalt 84 børn.

Stovnurin letur upp kl. 7.15 og letur aftur kl. 17.15. Gjáarlon er ein grønur stovnur, sum leggur dent á at fara væl um umhvørvið inni sum úti.

Umstøðurnar eru sera góðar bæði innan– og uttandura.

**Vit bjóða**
Í tí dagliga arbeiðinum leggja vit stóran dent á trivnaðin hjá starvsfólkum og børnum, og vit virka alsamt fyri at skapa álit og tryggleika fyri børn og foreldur. Gerandisdagurin er somu-leiðis merktur av, at vit eru ein grønur stovnur.

**Vit ynskja**
Vit leggja dent á, at tú hevur førleika at arbeiða sjálvstøðugt, ert ágrýtin og nýhugsandi. Tú tekur ábyrgd og virkar í góðum samstarvi við samstarvsfelagar og foreldur, og saman við okkum ert tú við til at menna tað námsfrøðiliga arbeiði. Vit vænta, at tú sært møguleikar og avbjóðingar fram um forðingar.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanarviðurskifti eru skipað sambært sáttmálanum millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til Morið A. O. Gardy, leiðara, á telefon 470134/230134 ella Marin í Niðristovu Durhuus, varaleiðara, á telefon 470138/230138.

Umsókn og freist
Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 11. september, kl. 12.00.

Setanarsamrøður verða í viku 37.

Send eina umsókn við avriti av prógvum og viðmælum til:

**Gjáarlon**
Hornavegur 16
FO – 350 Vestmanna

Umsóknir skulu merkjast »Gjáarlon«.

# Søkt verður eftir pedagogi ella hjálparfólki til Frítíðarskúlan í Saltangará

Frítíðarskúlin heldur til í Gomlu læknahúsinum á Heiðavegi 22 Saltangará. Frítíðarskúlin er normeraður til 37 børn.

Starvið, sum er 25 t.v., verður flokkað á lønarstig 11-17 ella 2-6 og er tíðaravmarkað fram til 31. juni 2007. Setanin verður ætlandi skjótast gjørligt ella frá 1. oktober 2006.

Arbeiðsuppgávan verður at stuðla og stimbra einum barni við serligum tørvi. Arbeiðsstaðurin verður partvíst í frítíðarskúlanum og heima.

**Vit ynskja at umsøkjarin:**
- er áhugaður at arbeiða við børnum við serligum tørvi
- er íðin, nærlagdur og álítandi
- hevur góð samstarvsevnri og er sjálvstøðugur
- hevur umsorgan og virðing fyri børnum

Starvið verður sett 1. oktober 2006 ella skjótast gjørligt.

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Nærri fæst at vita um starvið við at tosa við Lailu Weihe, leiðara á tlf. 216630.

Umsókn, við avriti av prógvi og møguligum viðmælum, skal vera kommununi í hendi, í seinasta lagi 31. august 2007.

RUNAVÍKAR KOMMUNA.

**Runavíkar Kommuna**
Sosiala deild
Heiðavegur 26
FO-600 Saltangará


Nýtt múraravirki

**Vit átaka okkum alt múraraarbeiði...**

sp/f MÚRARAVIRKIÐ
RDC
tel 59 20 30


## Lærlingur til goymsluna

Vit søkja eftir lærlingi til goymsluna. Í lærutíðini verður tú lærd/-ur í øllum vanligum goymsluarbeiði, umframt at tú fært gott innlit í bilar og KT-skipanir til eykalutir.

Løn sambært galdandi sáttmála.

Umsóknarfreistin er 31. august 2006. Umsóknir við prógvum og møguligum viðmælum skulu sendast til:

**BERG MOTORS**
SUZUKI STARAVEGUR 1-3 · 110 TÓRSHAVN

Nærri fæst at vita um starvið, við at ringja á tlf. 31 35 35 og tosa við Karin ella Júst.

*Berg Motors selur bilar av merkinum Suzuki, Subaru, Kia, Mazda, Land Rover og Scania lastbilar. Vit hava eykalutagoymslu til øll bilmerkini og mekaniskt-, plátu-, sproyti- og dekkverkstað*




**LOYSNIN!**

**...ein lykil til alt húsið, virkið ella skúlan !!**

**Vit loysa lás- og lyklatrupulleikar.**

**Vit eru serkønir í at gera:**

Ruko systemlás · Skipan av lásum
Umvælingar · Skera lyklar til · Umskipa

**TÓRSHAVNAR LÁSASERVICE**
v/Jahn Petersen
TEL 310 411 · FARTEL 215 411
teldupostur: lasasmid@post.olivant.fo





**HÚS Á TVØROYRI TIL SØLU**

Um hóskandi boð fæst, eru eini hús á Sevmýri til sølu. Húsini liggja sera væl fyri og hava frálíkt útsýni. 14oo fermetrar av jørð hoyra til. Húsini hava verið nýtt til virki og krevja ávísar ábøtur.

LÝSING S/PF

**RING 211218 ella 214218** -og hoyr nærri!



**Sosialurin**
www.sosialurin.fo



**Arbeiðshandskar**
*til øll endamál - bæði á sjógvi og landi*

Beinleiðis frá framleiðara

**Landsins størsta úrval**
frá eingangshandskum til fóðraðar Japan-handskar

ADC-Heilsølan spf
Láarvegur 14 • 100 Tórshavn • Tel. 315828 • Fax 315893
adc@adc.fo

Sosialurin 311820



**MASKINBÚÐIN**
v/ Kajberg Davidsen
FO 480 Skála

**Eg átaki mær nýgerð og umvælingar innan:**

**-Rør & Sanitet**

**Fartlf.: 58 43 15**